# Úr høll og út á vøll

*Fótbóltur: Síðstu innandura kappingarnar verða spældar samstundis sum farið verður undir fyrireikingarnar til uttandura kappingarnar*

Ljósini skyggja langt út á kvøldarnar inn á graslíkisvallirnar kring landið. Fótbóltsspælararnir eru longu komnir eitt sindur ávegis í fyrstu strævnu fyrireikingunum til nýggja fótbóltsárið, og í vikuskiftinum eru onkrir venjingardystir ásettir at vera.

Ofta hevur tað víst seg, at kavin hevur verið til stóran ampa fyri fótbóltsvenjingina. Higartil í ár hevur tað verið so hampuligt. Fyrrapartin í síðstu viku, tá fleiri feløg fóru á graslíkið at venja, kom eitt sindur av kava niður, og grønu vallirnir vóru hvítir okkurt kvøldið, men higartil hevur eingin rættuligur kavi verið. Men enn er tíðin til kava lítið liðin, og av royndum vita vit, at tað kann vera stórkavið í apríl.

**Liðugt innandura**

Hjá summum slitnar fótbóltsárið ongantíð sundur, og tað er ikki bara hjá landsliðsspælarunum, sum vita, at teir skulu venja og spæla mest sum alt árið.

Tá fyrstu ítróttarhallirnar síðst í seksti árunum vóru komnar í Klaksvík og í Havnini varð nógv gjørt við at spæla innandura fótbólt. Hetta hevur hildið sær síðani, men tey seinnu árini hevur verið spælt við stórum málum og sambært eitt sindur øðrvísi ásetingum, enn tað varð gjørt tey fyrru árini.

Eisini í vetur hevur verið nógvur innandura fótbótlur á skránni. Hjá teimum yngru hevur verið spælt so at siga hvørt vikuskifti. Síðsta vikuskifti varð skipað fyri kapping á Skála, og í bløðunum eru lýsingar, sum siga, at onkur kapping framvegis er á skránni.

Hjá teimum vaksnu er tíðarskeiðið innandura tódna eitt sindur, tí tíðarskeiðið uttandura er toygt. Kappingin í Vági plagar at vera ein tann fyrsta, aftaná at síðsta umfarið í FM kappingini er avgreitt og síðsta landsliðsferðin er liðug, og síðsta kappingin plagar at vera tann, sum GÍ plagar at skipa fyri stutt frammanundan at farið verður undir steypakappingina.

Síðsta vikuskiftið skipaði B68 fyri kapping í ítróttarhøllini í Runavík. 24 lið luttóku í kappingini, sum teir kallaðu fyri Føroya Tele Cup, tí tað var høvuðsstuðulin hjá B68, Føroya Tele, ið gav heiðursmerkini til trý tey bestu liðini.

Myndirnar, sum vit hava fingið sendandi av Toftum, eru av trimum teimum bestu liðunum.

JH


Vinnarar av kappingini gjørdist GÍ


Silvurmerkini vórðu latin til Port Vale…



…meðan Sheffield United endaði á triðja plássinum

# Grand-Prix í Badminton

*Hetta vikuskiftið verður enn eitt umfar í Grand-Prix kappingini í badminton avgreitt*

Jákup Mørk

Hetta vikuskiftið verður so næst seinast umfar í Grand-Prix kappingini hjá yngru leikarunum avgreidd.

Kappingin verður hildin í badmintonhøllini í Havn, og byrjað verður leygarmorgunin kl. 10.30, tá yngsti bólkurin, børn undir 10 ár, skulu spæla.

Síðani eru tað tey 10-12 ára gomlu, sum skulu royna seg um beint eftir døgurða, kl. 13.00 og klokkan 15.00 verður tað aldursbólkurin 12-14 ár.

Seinasta kappingin leygardagin verður tann fyri børn 14-16 ár, og verður tá byrjað kl. 16.30.

Sunnudagin verðu lagt fyri kl. 13.00, tá unglingar skulu á vøllin, ímeðan tey vaksnu fara at avgreiða sínar dystir frá kl. 14.00 sunnudagin.

**árið farið at halla**

Sum nevnt, so er hetta næst seinasta kappingin hjá yngru leikarunum. Seinasta umfarið hjá teimum verður hildið 4. mars, tá ítróttarhøllin í Vestmanna verður karmur um endaspælið.

Tá dystirnir í seinasta umfarinum, endaspælinum, eru liðugt leiktir, verða steyp og heiðursmerki handa teimum luttakarnum, sum hava vunnið sær flest stig í árinum.

Vaksnu leikararnir enda tó ikki hetta vikuskiftið, men hava framvegis tvey umfør eftir í kappingini, umframt kappingina hetta vikuskiftið.

**FM kappingin eftir**

Badminton árið snýr seg tó ikki bert um Grand-Prix kappingina.

Kappingarnevndin hjá Badmintonsambandinum hevur boðað frá, at 25. mars verður skjøtil settur á FM-kappingina.

Treytirnar tá verða eitt sindur øðrvísi enn í Grand-Prix kappingini, tí hevur tú ein ringan dag og tapir, ert tú úti alt fyri eitt.

Hvør av leikarunum tá hevur ein góðan dag og síðani kann kalla seg FM-vinnara, vita vit sjálvsagt ikki enn, og fyri fyrst er spurningurin altso, hvør teirra fer at gerast Grand-Prix vinnari.





Viðmerking:

# Sosialurin komin í óføri av Tjóðveldinum

Við at lesa hesa oddagrein sæst, at Sosialurin er komin í óføri av sínum egnu ósannindum um oddamenn Tjóðveldisfloksins. Tað einasta, hetta sokallaða tíðindablað livir av, er at spilla tjóðveldisfólk út.

Tá sagt verður, at Tjóðveldisflokkurin hevur eitt »forkláringsproblem« bæði í sambandi við Vágatunnilin og oljuútgerðarhavnina, kann eg í hvussu er sláa fast, at Javnaðarflokkurin hevur eitt nógv størri »forkláringsproblem« í sambandi við Vágatunnilin. Tá ein samgonga ikki er samd um eitt ávíst mál, liggur bólturin hjá andstøðuni. Men hvussu brúkti andstøðan henda upplagda møguleika? Um so var, at teir í heila tikið meintu nakað sum helst við tað, sum teir fyrr hava vartað upp við. Møguleikarnir vóru av teimum allar bestu at gjørt sína ávirkan galdandi. Men hvat gjørdu teir?

Sagt verður í oddagreinini: Hinvegin stendur rimmarfast, at í vinnunevndini tóku bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin undir við tí, sum Heini O. Heinesen ferð eftir ferð nevndi í fjølmiðlunum, nevniliga at Landsverkfrøðingurin skuldi standa fyri arbeiðinum og ikki eitt partafelag. Sitat endað. Hetta var í hvussu er ikki tað, sum eg upplivdi í vinnunevndini. Tá sambandsumboðið Alfred Olsen kom við sínum egna uppskoti, kundi eg ikki rokna við stuðuli frá Sambandsflokkinum, og tóku Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin undir við Alfred Olsen. Tá visti eg, hvat klokkan hevði sligið, fyri nakrari sum helst broyting. Í mínari verð var orðingin í tí fyrsta uppskotinum hjá Alfred Olsen so veik, at hetta segði mær einki. Hetta var aftaná, at eg hevði lagt eitt meira víttgangandi uppskot fyri alla nevndina, sum gekk uppá at partafelagið skuldi standa fyri fíggingini, meðan Landsverkfrøðingurin skuldi standa fyri verkætlanini um møguligt útlisiterað arbeiðið. Hetta stóð upp til landsstýrismannin sum sambært stýrisskipanarlógina skal hava ábyrgdina av sínum gerðum. Tað sá út til, at umboðini fyri Javnaðarflokkin tóku undir við síðst nevnda uppskoti.

Men tann 25. januar í kvøldsendingini hjá útvarpinum varð sagt, at Javnaðarflokkurin fór at taka undir við sambandsuppskotinum.

Tað var hetta, sum gjørdi, at eg morgunin eftir tann 26. januar valdi at fáa eina samda nevnd við at styrkja um uppskotið frá Alfred Olsen, sum tá allir hinir nevndarlimirnir søgdu seg at taka undir við frammanundan.

Tá Sosialurin sigur, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin tóku fult undir við tí, sum eg haviført fram í fjølmiðlunum, so er veruleikin ein heilt annar.

Hetta var eg noyddur at taka til eftirtektar. Tí nyttar tað ikki Sosialinum at billa sínum lesarum nakað inn, sum ikki samsvarar við veruleikan.

Tá sagt verður, at eg atkvøddi ímóti uppskotinum, so er hetta heldur ikki rætt. Eg atkvøddi fyri broytingaruppskotinum. Men eg atkvøddi blankt, tá tað kom til upprunauppskotið. Eg haldi ikki, tað kann góðtakast, at eitt alment partafelag verður stovnað bert uppá eina viðmerking á eini eykajáttanarlóg. Og so eitt ár seinni at koma í tingið og biðja um heimildina aftaná at hava disponerað og brúkt 6 milliónir.

Herafturat varð avtala gjørd við tvey norsk feløg. Við at lesa viðmerkingarnar til lógaruppskotið, er tað ein stórur spurningur, um landsstýrismaðurin í heila tikið hevur brúk fyri løgtinginum í hesum máli.

Sagt verður, at partafelagið »Vágatunnilin« er stovnað, 21. desember 1998 við einum partapeningi uppá 20,3 mió. Herafturat verður sagt, at leiðsla felagsins er ein 5 manna nevnd, sum landsstýrismaðurin sjálvur hevur valt. Um so er, at heimildin er í lagi fyri at stovna partafelagið og flyta tær fyrstu 20,3 mió. úr landskassanum í partafelagið uppá eina viðmerking á eini eykajáttan, kann tað ikki vera nakað í vegin fyri at flyta restina av teimum 160,3 milliónunum úr landskassanum uppá eina viðmerking á tí árligu fíggjarlógini.

Tað tykist løgi, at landsstýrismaðurin í samferðslumálum skal koma við einum slíkum uppskoti. Har hesin frásigur sær og komandi landsstýrismonnum so gott sum alla ábyrgd og ávirkan á tað størsta samferðsluprojektið í Føroya søgu higartil. Ikki nokk við tí, løgtingið verður fullkomuliga uttan ávirkan. Landsverkfrøðingurin, sum byrjaði upp á arbeiðið í 1988, verður eisini settur uttanfyri. Tað er hesin landsins stovnur, sum situr inni við royndum, akkumuleraðar upp í meira enn hálva øld, hetta bæði á heimavølli og í tøttum samspæli við útheimin. Tunnilin er í prinsippinum einki øðrvísi enn aðrir vegastubbar. Tað einasta, sum brýtur av, er ætlanin, at fíggja ein lítlan part av íløguni við bummpeningi. Tað vil siga, um kostnaðarmetingin, sum er í uppskotinum heldur.



Landsverkfrøðingsstovn-urin hevur haft prosjektleiðsluna frá fyrsta degi av. Tað er umráðandi, at tað eru føroyingar sjálvir, sum í størst møguligan mun standa fyri tunnilsarbeiðinum og prosjektinum.

Eg vil sláa fast, at hetta var tað einasta, sum eg kundi fáa samtykt í løgtinginum. Tað at tað var ein samd nevnd, var heldur ikki at forkasta, í einum so stórum máli.

**Heini O. Heinesen**

# Samtyktirnar í Tórshavnar Býrað verða ikki virdar!

Seinastu tíðina hevur verið eitt ávíst orðaskifti í bløðunum og í útvarpinum Rás2, um barnaansingina í høvuðstaðnum.

Umrøðan byrjaði, eftir at undirritaði sum næstformaður í sosialu nevnd, reisti spurningin um barnaansingina í nevndini, fyrst í hesum árinum.

Spurningurin varð reistur, eftir at nógv foreldur ferð eftir ferð høvdu sagt seg ivast í mannagongdini, tá børn verða skrivað upp til barnaansingina. Og foreldur settu eisini spurnartekin við, hvussu børn sleppa í barnaansing.

**Reglugerðin virkar ikki**

Vit vita øll, at tørvurin á barnaansing framvegis er stórur, hóast munagóð tiltøk eru gjørd seinastu árini.

Eitt av tiltøkunum fyri at bøta um støðuna, varð býráðssamtyktin í mars í fjør. Tá samtykti fyrst sosiala nevnd - eg var sjálvur formaður har tá, og síðani býráðið, eina reglugerð fyri barnaasingina í býnum.

Reglugerðin er í 14 punktum. M.a. stendur í reglugerðini, at kommunan skal býtast upp í 4 barnaansingarøkir. Øll sum søkja um ansingarpláss skulu fáa skrivligt svar um, nær umsóknin er móttikin, og samstundis skulu tey fáa at vita, hvat nummar barnið er á bæði tí samlaða bíðilistanum og á økisbíðilistanum, og nær barnið væntandi fær pláss. Og eftir reglugerðini skuldi ein upptøkunevnd setast.

Samstundis varð álagt umsitingini at fáa til vega eina telduskipan, so léttari var at fylgja gongdini við barnaansingini.

Eg kann her leggja aftrat, at tað hevði uttan iva verið betri at havt eina skipan til uppskriving av børnum, heldur enn 4 økisskipanir. Tí nógv foreldur kenna seg at detta niðurímillum í skipanini.

Og tað vóru júst foreldur sum gjørdu vart við, at tey ikki kendu seg trygg við skipanina.

Tí varð málið reist, og tað vísti seg, at samtykta reglugerðin og annars alt sum var samtykt í sambandi við hana, als ikki var farið at virka. Tað er ov vánaligt at umsitingin letur næstan eitt ár ganga, áðrenn samtyktirnar verða settar í verk, og tað økir ikki um virðingina ímillum borgarnar.

**Próvbyrðan er hjá tí sum kærir**

Foreldur hava verið í bløðunum og sagt, at okkurt er spinnandi galið við uppskrivingini til barnaansingina í kommununi.

Bert tað at foreldur ivast, er nóg mikið til at málið verður viðgjørt einaferð enn. Tað kundi bent á, at skipanin við nýggju reglugerðini ikki er nóg góð. Og tá tað er staðfest, at reglugerðin als ikki er farin at virka, so er støðan ikki øðrvísi enn hon var frammanundan.



Býráðsformaðurin hevur eisini verið alment frammi, og hann er endurgivin fyri at siga, at próvbyrðan liggur hjá tí sum kærir!

Hetta er ikki ein spurningur um at kæra nakran um nakað. Hetta er ein spurningur um at fáa umsitingina at virða tær samtyktir sum býráðið hevur gjørt. Og tað at samtyktirnar ikki eru settar í verk eitt á seinni, taki eg sum væntandi virðing fyri samtyktum í býráðnum.

**Og tað er júst tað sum ikki skal henda!**

Býráðsformaðurin hevur skyldu til at seta samtyktirnar hjá býráðnum í verk. Og at hann ikki hevur gjørt tað, er átaluvert!

**Gongd komin á málið!**

Eg havi sett nakrar spurningar í sosialu nevnd. Allir spurningarnir eru settir, eftir at fleiri foreldur hava tosa við meg.

Og hóast tað tykist at verða torført at fáa svar uppá spurningarnar, so standa teir við.

- Eg vil hava eitt yvirlit yvir upptøku av børnum í 1998 og 1999?
- Yvirlit yvir nær børnini eru fødd, nær tey eru komin á bíðilista, og nær tey eru komin inn?
- Hvørji børn sleppa inn á ár 2000?
- Eru børn sloppin inn, sum komin eru av bygd, ella úr útlondum?
- Eru tað politikararnir ið gera av, hvør sleppur inn á stovn?
- Nær verða brøvini, sum upplýsa foreldrunum, hvørji, og nær børnini sleppa inn, send?

Hetta eru spurningar sum neyðugir eru at seta, so foreldur ið ikki sleppa til arbeiðis, ikki bíða til fánýtis.

Í hesum sambandi er vert at leggja aftrat, at upptøkunevndin sum varð samtykt í mars í fjør, er sett herfyri. Tað er at fegnast um, men tað er alt ov seint.

Og eg vóni at viður-skiftini á barnaansingarøkinum koma uppá pláss alt fyri eitt, so borgararnir kunnu hava virðing fyri býráðsarbeiðinum í høvuðsstaðnum.

**Heðin Mortensen,**
**býráðslimur**

# Føroyskir sálarfrøðingar skipa seg í felag

Sálarfrøðingar eru fámentur yrkisbólkur í Føroyum. Sammett við støðuna í grannalondunum, eru lutfalsliga fá størv innan sálafrøðiliga tænastu, í mun til fólkatalið. Hóast nakað av samstarvi hevur verið neyðugt um ávísar arbeiðsuppgávur, hevur enn ikki verið grundarlag fyri egnum, sjálvstøðugum felagi fyri henda yrkisbólk.

Vaksandi tørvur og eftirspurningur, eisini innan nýggj arbeiðsøki, hevur tó havt við sær at størvini nú eru vorðin nóg nógv í tali til slíkt felag. 24 september 1999 komu sálarfrøðingarnir fyri fyrstu ferð saman til fundar at umrøða felags áhugamál. Fleiri fundir vórðu hildnir eftir henda, og 30. november 1999 varð gjørt av at stovna eitt felag.

Stovnandi aðalfundur varð 10. januar 2000, har viðtøkur vórðu samtyktar um endamál og virki felagsins. Endamál nýggja felagsins er at røkja faklig áhugamál hjá føroyskum sálarfrøðingum, at fremja áhugan fyri sálarfrøði og økja kunnleikan um tann týdning fakið hevur, at skapa umstøður at fremja sálarfrøðiliga gransking og praktiskt virksemi, og at virka fyri at eftirútbúgvingin av sálarfrøðingum í Føroyum fylgir við altjóða menningini á økinum.

Ítøkilig virkisøki eru at fremja samstarv millum sálarfrøðingar og aðrar viðkomandi yrkisbólkar, samstarva við felagsskapir og stovnar í Føroyum og uttanlands, sum hava týdning fyri sálarfrøðiliga økið, skipa fyri felagsfundum og fáa í lag eftirútbúgvingarskeið fyri limir felagsins.

Hóast felagið umboðar limir sínar mótvegis teim myndugleikum og øðrum, sum hava ávirkan á virksemið hjá sálarfrøðingum, so verða lønar- og arbeiðsviðurskifti hjá alment settum sálarfrøðingum framvegis sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Á aðalfundinum 10. januar 2000 valdu limirnir felagsnevnd, sum hevur skipað seg við Kára Leivsyni Petersen sum formanni, Hera Kragesteen sum næstformanni og Onnu Debes Hentze sum skrivara.

Ein tann fyrsta arbeiðsuppgáva hjá nýggju nevndini verður sáttmálin millum felagið og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya um fíggjarligt ískoyti til sálarliga viðgerð, sum verður kunngjørdur í næstum.